VALGREINAR

# Heilsan til allar veljarar í Norðoyggjum

**Absalon Matras**
*valevni Sambandsflokksins í Norðoyggjum*



Eins og árstíðin ber boð um lív og gróður í náttúruni, so bera veljarakanningarnar boð um vøkstur, vælferð og friðaligari tíðir hjá Føroya fólki. Vónandi verður "konfrontatiónin," sum hevur verið so niðurbrótandi hetta valskeiði, nú avloyst av samstarvi í sátt og semju.

Eftir 4 ár við bítandi kulda í viðurskiftunum ímillum Føroyar og Danmark, leingjast vit nú eftir góðveðri, gróðri og góðum samstarvi við hin partin av ríkinum.

Vit í Sambandsflokkinum fegnast um veljarakanningarnar sum geva flokkinum framgongd. Aftaná mong ár uttan nakran tinglim í Norðoyggjum, sær tað nú út til at fara at bragda. Tó, veljarakanningar eru eitt, løgtingsvalið er nakað annað.

Góðu veljarar, nú er so valorrustan um at verða av á hesum sinni, og havi eg roynt at nomi við nøkur mál, ið hava mín áhuga og eisini almennan áhuga. Eg fari hervið at heita á tykkum um at fara fjøllment á val og velja Sambandsflokkin lista B, tí sambandspolitikkur fremur framburð, vælferð og trygd fyri okkum øll í Norðoyggjum og føroyingar allar.

At enda vil eg ynskja øllum eitt gott val.

# Val og valstøð

**Sámal Petur í Grund**
*landsstýrismaður*



Nakað av tí sum hevur sett sín serliga dám á valkvøldini í okkara samfelag er tað at fylgja við í útvarpi og sjónvarpið, hvussu gongst hjá teimum ymsu flokkunum.

Eitt sera spenndandi kvøld fyri tey sum hava bjóðað seg fram, men ikki bara fyri tey, í teim ymsu heimunum landið runt økist spenningurin so hvørt sum úrslitini koma inn.

At okkurt valstað fellur burtur av natúrligum grundum er einki at gera við, men tað er saknur í tí alíkavæl.

Tað var ikki eiðasørt, at tað kendist sárt, tá seinasta búfólkið á Skarvanesi bleiv borið út og lagt til hvíldar. Øskukalt í eini bygd sum hevði kent betri dagar. Og sum ein natúrlig fylgja bleiv valstaðið harvið niðurlagt.

Heilt til tað seinasta varveitti bygdin valstað sítt, hóast bert ein veljari var.

Virðingin fyri at hetta var ein bygd var helst grundin og takk skulu tit hava, sum bóru so í bandi.

Somu virðing kenna vit ikki um alt landið, bygdir við útvið 300 veljarum missa í hesum døgum, ímóti sínum vilja, valstað sítt og enn eru grundirnar ikki komnar í ljósmála.

Hví skulu Rituvíkingar, Æðuvíkingar, Glyvrafólk, Lambafólk og Søldfirðingar ikki meira sleppa at velja har fedrar teirra gjørdu tað?

Er tað tí, at valhølini eru blivin ov lítil? Nei helst er tað bert manglandi virðing fyri fólkinum har býr og fedrum teirra.

Undirritaði hevur í opnum brævi til Runavíkar býráð spurt um grundina og vónandi ber til at kasta ljós yvir hesi viðurskifti.

# Lestrarstuðulin afturúrsigldur enn einaferð

**Kenneth Rasmussen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



1. august 1999 varð nýggj løgtingslóg um útbúgvingarstuðul sett í gildi. Síðan 1988 hevði stuðulin verið óbroyttur. Eftir gomlu skipanini fingu útibúgvandi 2.200 krónur um mánaðin, so eingin ivi er um, at skipanin var afturúrsigld. Løgtingslógin um úbúgvingarstuðul frá 1988 gav øllum lesandi rætt til lestrarstuðul, meðan galdandi lóg bert gevur lesandi, sum eru 18 ár og eldri hendan møguleika. Tó fáa tey, ið eru undir 18 bókastuðul og vistarhaldsstuðul, um bústaðurin er meiri enn 50 km heiman, ella sjóvegis flutningur er neyðugur.

**Er tað ókeypis at verða 17 ár?**
Tíðin er nú aftur komin at dagføra allan útbúgvingarstuðulin. Hesaferð má skipanin verða fyri øll; eisini tey, sum ikki eru fylt 18 ár. Tí hesi hava sjálvsagt somu útreiðslur sum skúlafelagarnir, ið eru vorðnir 18 ár. Vit mugu endurskoða skipanina, og laga hana til kostnaðarstøði í dagsins Føroyum. Tað er týdningarmikið at tað er stuðulsupphæddin og ikki láni-upphæddin, sum verður hækkað.

Tí um tann lesandi eftir lokna útbúgving skal taka bústaðarlán, og frammanundan hevur eitt stórt lán frá tíðini á miðnámsskúla og hægri lærustovni at dragast við, verður fíggjarliga byrðan ovurstór. Hetta kann hava stóra ávirkan á einstøku familjuna og harvið á alt samfelagið.

Tí er umráðandi at øll neyðug atlit verða tikin í arbeiðinum at dagføra útbúgvingarstuðulin.

Talvan vísir lestrarstuðulin í Føroyum, Danmark og Norra. Upphæddirnar eru í DKK.

Sí talvu!

**Lærlingar = studentar**
Handverkslærlingar eru í lærutíðini løntir av lærumeistaranum. Meðan teir ganga á tekniskum skúla, fær meistarin ein part av lønini endurgoldna frá tí almenna. Nógvir av hesum lærlingum ferðast dagliga til og frá skúlanum, men teir fáa ongan ferðastuðul. Meðan skúlagongdin fór fram, áttu lærlingarnir at fingið eitt ískoyti til ferðing, sum svaraði til kostnaðin við almenna ferðafólkaflutninginum á farleiðini. Hesin spurningurin má eisini takast upp til viðgerð í komandi valskeiði.

Vel lista D, tað loysir seg. (og rímar!)

| | Føroyar | Danmark | Norra |
|---|---|---|---|
| Heimabúgvandi | kr. 2.205 | kr. 2.103 | 0 |
| Útibúgvandi | kr. 3.308 | kr. 4.231 | kr. 1.850 |
| Lán | kr. 2.098 | kr. 2.165 | kr. 4.955 |
| Stuðul + lán | kr. 5.406 | kr. 6.396 | kr. 6.805 |

# Ansingartrygd til øll børn

**Karl Heri Joensen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Norðuroyggjum*



Fleiri ferðir hevur verið at sæð undir hesum valstríðnum, at løgtingið eigur at áleggja kommununum at tær veita ansingartrygd til børn. Ein tann seinasti, ið hevur ført hetta fram, er bygdarráðsformaðurin av Strondum, sum er uppstillaður í Norðuroya valdømi.

Barnaansingarøkið hevur inntil fyri 2 árum síðani verið felagsmál millum land og kommunur. Skipanin tá var, at skuldu íløgur gerast til ein ansingarstovn, rindaðu landið og kommunan hesa útbygging.

Viðvíkjandi rakstri var býtið soleiðis, at landið rindaði 40 %, kommunurnar 30 % og foreldrini 30 %.

Nú kommunurnar hava yvirtikið barnaansingarøkið, rinda tær fult og heilt allar íløgur á hesum øki, meðan raksturin verður býttur millum foreldrini og kommunurnar, við ávíkavist 30 og 70 %.

Ein av orsøkunum til at kommunurnar so grammar yvirtóku barnaansingarøkið var, at meðan bíðilistarnir um alt landi vóru uppá nógv nógv hundrað børn, vildi landið ikki raðfesta íløgur til neyðugar útbyggingar. Síðan kommunurnar yvirtóku barnaansingina, eru gjørdar heilt munandi økingar, hóast ikki er komið er á mál.

Eg ivist onga løtu í, at allar kommunur fegnar vildu veitt foreldrum ansingartrygd av teirra børnum. Hetta er jú neyðugt fyri at tryggja vinnuni ta arbeiðsmegi hon hevur tørv á, og er tí við til at menna framhaldandi útbyggingar og framburð í okkara samfelag.

Klaksvíkar býráð hevur sæð tað neyðuga í, at útvega ansingarpláss til øll børn í kommununi, og hevur tí sett sær fyri, at vit vilja veita fulla ansingartrygd, áðrenn hendan býráðssetan er av. Í 1999 stóðu væl omanfyri 300 børn á bíðilista í Klaksvíkar kommunu. Í dag er bíðilistin komin niður á uml. 120 børn, og gongur sum ætlað, verður ansingarmøguleiki givin til uml. 80 børn afturat í hesum árinum, meðan arbeiðið við at fáa tann seinasta partin av bíðilistanum burtur er farin í gongd.
http://www.get.to/pms

# Fólkaflokkurin og oljuvinnan

**William av Vollanum**
*valevni Fólkafloksins í Norðstreymoy*



Undir valstríðnum í 1998 hevði Fólkaflokkurin við í síni valskrá eitt uppskot til oljupolitikk, har mett varð, at byrjast skuldi skjótast gjørligt við hesi vinnu.

Tá so løgmaður setti sínar landstýrismenn, vóru tað fólk, sum høvdu at og onnur høvdu hug at smírast, tí nú hevði løgmaður sett ein landstýrismann í olju og umhvørvismálum.

Onkur tók til, at Føroyar mundi verða tað fyrsta landið í heiminum, sum hevði ein oljumálaráharra, men onga olju.

Landstýrið fer síðan, við Fólkaflokkinum á odda, til verka. Tað fyrsta, sum verður loyst, er marknaðarspurningurin við Bretland.

Fyrireikingarnar til oljuvinnuna verða síðan lagdar væl til rættis og oljulóggávan kemur uppá pláss.

Loyvi verða givin oljufeløgum til at bora eftir olju.

Byrjað verður at gera útgerðarhavn í Runavík til at taka ímóti útgerðarskipum.

Statoil er fyrsta oljufelag, sum byrjar at bora, seinni byrjar eisini BP. Men hesi hava ikki eydnuna við sær og velja at gevast, tá nátt er niður á ætlaða dýpið, uttan at nakað spyrst burturúr.

Triðja stóra oljufelag, sum fer í gongd við oljuboring, er Amerada Hess, og hesaferð gongur betur. Eftir at borað er longri niður enn ætlað, verður staðfest, at olja er í føroysku undirgrundini.

Liðin eru fýra ár, síðan nýtt landstýri kom til. Í dag munu tað verða fá, sum hava at. Heldur fleiri smírast, vitandi um, at í føroysku undirgrundini finnast tað nú týðandi nøgdir av olju og gassi.

Hetta er bara eitt dømi um ein flokk við framskygni, drívmegi og ábyrgd.

Gott val

ítróttur

Nr. 77 • mikudagur • 24. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Petur Grønagarð fór við gullinum

**Tað vóru báðir favorittarnir, Petur Grønagarð og Remy Hansen, sum møttust í finaluni í einmansleiki, og Petur dró longra stráið. Í tvímansleiki vunnu Jens Petur Poulsen og Flemming Hansen á Peturi Grønagarð og Henningi Thomsen**

DART
*Stefan í Skorini*



*Vinnari í einmansleiki gjørdist Petur Grønagarð, sum stendur í miðjuni við tí stóra steypinum. Nummar tvey var Remy Hansen. Hinir á myndini eru tapandi hálvfinalistarnir*

Um vikuskiftið endaði kappingarárið í dart, og endabresturin var FM-kappingin, sum hesuferð var í B36-húsinum í Havn.

Leygardagin varð kappast í einmansleiki. 24 teir fremstu á styrkilistanum sleppa at luttaka, men vegna avboð sluppu nakrir, sum liggja longri niðri á listanum, eisini at luttaka.

Allir leikararnir, sum vóru styrkismettir ovast, gjørdu sína skyldu í bólkaspælinum, og tí møttist eingin av favorittunum í áttandapartsfinalunum. Nakrar av hesum finalunum gjørdust spennandi, men favorittarnir drógu longra stráið.

Fjórðingsfinalurnar gjørdust als ikki spennandi, hóast talan skuldi verið um javnar mótstøðumenn. Poul Poulsen, Petur Grønagarð og Alvin Egholm høvdu allir lætt við at spæla seg í hálvfinalurnar, meðan Remy Hansen hevði heldur tungt við at syfta Jens Petur Poulsen.

Remy Hansen vann í aðrari hálvfinaluni 5-1 á Poul Poulsen. Í hinari hálvfinaluni mátti føroyameistarin frá í fjør, Alvin Egholm, dvína fyri Peturi Grønagarð, sum vann 5-3. Sostatt møttust Remy Hansen og Petur Grønagarð í finaluni, og hesir báðir vóru frammanundan mettir sum sterkastu luttakararnir.

Finalan gjørdist rættiliga spennandi. Teir báðir fylgdust upp til 4-4, og Petur Grønagarð legði seg síðani framum. Tíggjuna og avgerandi settið vann Petur, og hann kundi hevja armarnar ... FM-heitið einaferð.

Remy Hansen hevur framvegis sítt fyrsta FM-heiti til góðar, hóast hann tvey tey seinastu árini er endaður ovast á styrkilistanum fyri alt kappingarárið.

## Tvímansleikur

Frí tilmelding var til kappingina í tvímansleiki, men bara trettan pør luttóku. Alvin Egholm og Oddfinn Hansen møttu Jens Peturi Poulsen og Flemmingi Hansen í hálvfinaluni. Jens Petur og Flemming vunnu tó tepurt 5-4 og fóru víðari í finaluna.

Remy Hansen og Jan Midjord møttu Peturi Grønagarð og Henningi Thomsen í hinari hálvfinaluni. Henning og Petur vunnu sannførandi 5-1.

Petur og Henning høvdu vunnið FM í tvímansleiki tvey ár á rað, meðan hetta var fyrsta finalan hjá hinum parinum.

Jens Petur Poulsen og Flemming Hansen vóru favorittar í finaluni, og tað megnaðu teir eisini at liva upp til. Teir vunnu finaluna sannførandi á Peturi Grønagarð og Henningi Thomsen. Úrslitið var 6-1, og veruligur spenningur var ongantíð í finaluni.

Føroya Bjór stuðlaði FM-kappingini í dart.



*Føroyameistarar í tvímansleiki í dart eru Jens Petur Poulsen og Flemming Hansen. Teir vunnu sannførandi í finaluni á Peturi Grønagarð og Henningi Thomsen*

# Føroyar spælir í Hannover

LANDSDYSTUR
*Stefan í Skorini*

Dysturin hjá føroyska landsliðnum móti Týsklandi skal spælast í Hannover. Hetta var greitt fyri stuttum. Dysturin verður leiktur á leikvøllinum Niedersachsen Stadion, sum hevur pláss fyri 50.000 áskoðarum.

Dysturin verður spældur mikudagin 16. oktober í ár. Tá kemur landsliðið beina leið úr Litava, har liðið spælir leygardagin frammanundan.

Hannover liggur stutt sunnanfyri Hamburg og Bremen. Tí skuldi ligið væl fyri hjá føroyskum viðhaldsfólki at lagt leiðina til Hannover, sum liggur í landslutinum Niedersachsen og hevur góða hálva millión íbúgvar.

Leikvøllurin í Hannover varð nýttur bæði til HM í 1974 og til EM í 1988. Ætlanin er eisini, at Hannover verður ein av býunum, har HM í 2006 verður leikt.

Niedersachsen Stadion er júst umvælt fyri 100 milliónir týskar markar, og umvælingin skal gerast liðug í summar, so føroyska landsliðið kemur til eitt nýumvælt stadion, tá leikararnir møta Týsklandi.

# Ingi Højsted kom inn fyri Arsenal

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Ingi Højsted og hinir á U-17 liðnum hjá Arsenal máttu sunnukvøldið lúta fyri Newcastle United í fjórðingsfinaluni í kappingini um enska meistaraheitið.

Ingi kom á vøllin í 25. minutti fyri Frankie Simek. Tá var støðan 1-1. Arsenal hevði lagt seg á odda, tá bara ein minuttur varð leiktur, men Newcastle svaraði aftur tveir minuttir seinni.

Stutt fyri hálvleik legði Newcastle seg framum, og Arsenal megnaði ikki at reisa seg aftur. Ingi Højsted er yngri enn teir flestu á liðnum, men hóast sín unga aldur ger hann seg galdandi í London.

# Tjaldur fingið heimasíðu

HEIMASÍÐA
*Stefan í Skorini*

Hondbóltsfelagið Tjaldur úr Runavík hevur nú fingið sær eina heimasíðu á internetinum. Endamálið er at styrkja sambandið millum leikarar, limirnar og onnur, ið hava áhugað fyri felagnum. Felagið varð stovnað 29. oktober 1998 við tí endamáli at skipa fyri hondbólti og øðrum ítrótti og at vera siðmennandi fyri ungdómsarbeiði í røttum ítróttaranda.

Heimasíðan hevur upplýsingar um nevndirnar, liðini, spælarar, dómarar og kontaktfólk. Harumframt er yvirlit yvir venjingartíðir, lógir felagsins, og heimasíðan fer eisini at lýsa við teimum tiltøkum, sum felagið skipar fyri. Slóðir eru til flest allar aðrar føroyskar ítróttarsíður. Eisini eru slóðir til ruturnar hjá Strandfaraskipum Landsins.

Adressan á heimasíðuni er: http://heima.olivant.fo/~tjaldur.fo/ .Til ber eisini at senda felagnum ein teldupost á tjaldur@post.olivant.fo.